# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 19.04.2021 kl. 16.00

Á fundi: Janus Thomsen
Ronni Hammer
Eir J. Norðberg
Gunnhild Mortensen
Niels Olaf Eyvindsson
Thorstein Thomsen
Martin í Nesi

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

1. **Umsókn um stuðul frá felagnum Sjódypp.**
   Áhugafelagið Sjódypp søkir um stuðul til baðistað í Tjaldavík.
   **Fíggjarnevndin 19.04.2021:**
   Samtykt varð einmælt at mæla til ikki at stuðla verkætlanini.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

2. **Umsókn um fíggjarligan stuðul frá felagnum Víkingaskipið.**
   Søkt verður um, at kommunurnar í Suðuroynni í hesum umfari gjalda kr. 20 pr. borgara, t.v.s. Hvalbiar Kommuna umleið kr. 13.400.
   **Fíggjarnevndin 19.04.2021:**
   Nevndin mælir til ikki at stuðla verkætlanini.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

3. **Umsókn um fíggjarligan stuðul frá Suðuroyar Sjónleikarafelag.**
   Søkt verður um stuðul kr. 10.000 til leikin "Suðuroyar søgur – eitt 100 ára tíðarskeið".
   **Fíggjarnevndin 19.04.2021:**
   Nevndin mælir til ikki at stuðla hesum.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

4. **Umsókn um stuðul frá Nýggjársnevndini í Hvalba.**
   Søkt verður um stuðul til keyp av fýrverki og øðrum tilfari til nýggjárshaldið.

**Fíggjarnevndin 19.04.2021:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at stuðla nýggjársnevndunum í sóknini soleiðis frá 2021 til 2024:

| | |
|---|---|
| Hvalba: | kr. 20.000,00 |
| Nes: | kr. 10.000,00 |
| Sandvík: | kr. 10.000,00 |

Viðmerkjast skal, at kommunan ikki stuðlar við keypi av øðrum fýrverki umframt.
**<u>Avgerð</u>:**
Samtykt varð við fýra atkvøðum fyri at stuðla soleiðis frá 2021 til 2024:

| | |
|---|---|
| Hvalba: | kr. 35.000,00 |
| Nes: | kr. 10.000,00 |
| Sandvík: | kr. 10.000,00 |

5. **<u>Umsókn um fíggjarligan stuðul frá Dagtilhaldinum í Hvalba</u>.**
Søkt verður um stuðul kr. 10.000 um árið, umframt gjald av leigu til missiónshúsið kr. 4.500 um árið.
**Fíggjarnevndin 19.04.2021:**
Nevndin mælir til at stuðla við kr. 10.000 um árið til Dagtilhaldið og at gjalda leiguna til missiónshúsið kr. 4.500 um árið hetta valskeiðið, treytað av, at virksemið heldur fram.
**<u>Avgerð</u>:**
Einmælt samtykt

6. **<u>Umsókn um stuðul til verkætlanina Spírar ll</u>.**
Verkætlanin byggir á undanfarnu Spírar l og ætlanin við Spírar ll er at gera 10 nýggjar barnasendingar og 130 filmsbrot.
**<u>Avgerð</u>:**
Samtykt við fýra atkvøðum fyri at stuðla við kr. 3.000.

7. **<u>Umsókn um stuðul til Summartónar 2021</u>.**
Summartónar hava skipað fyri sangframførslum kring landið síðani 1992. Søkt verður um kr. 14.000 í stuðli til konsertirnar í Hvalba.
**<u>Avgerð</u>:**
Samtykt varð við seks atkvøðum fyri ikki at stuðla hesum.

8. **<u>Umsókn um stuðul til kappingarárið 2021 frá FSR</u>.**
Søkt verður um stuðul til viðlíkahald av bátum, vognum og aðrari útgerð felagsins.
**Fíggjarnevndin 19.04.2021:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at stuðla felagnum við kr. 7.000 í ár.
**<u>Avgerð</u>:**
Einmælt samtykt.

9. **Umsókn um stuðul frá Suðuroyar Hestafelag.**
   Felagið søkir um stuðul til felagsfjósið í Grønudali.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð ikki at stuðla hesum.

10. **Umsókn um stuðul frá Boliviahjálpini á Glasir.**
   Boliviadagurin er eitt átak hjá miðnámsskúlanæmingum at savna pening inn til neyðhjálp.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt ikki at stuðla hesum.

11. **Umsókn um stuðul til túr við brúkarum á røktarheimum/dagtilhaldum.**
   Sunrid Olsen er samskipari av túri til Havnar við teimum gomlu og spyr um peningagávu til henda túr.
   **Fíggjarnevndin 19.04.2021:**
   Samtykt við tveimum atkvøðum fyri at stuðla hesum túri við kr. 2.000.
   **Avgerð:**
   Samtykt við seks atkvøðum fyri at stuðla túrinum við kr. 2.000.

12. **Umsókn um stuðul til føroysk barnabløð frá BFL.**
   Kommunufelagið hevur móttikið umsókn frá BFL um at stuðla barnabløðunum Píka7 og Strok við kr. 100 fyri hvønn næming, soleiðis at allir næmingar í 0.-7. flokki fáa bløðini 7 ferðir um árið ókeypis.
   **Fíggjarnevndin 19.04.2021:**
   Samtykt varð einmælt at mæla til at verða við í hesum, treytað av, at peningurin fer av rakstrarjáttanini hjá Hvalbiar skúla.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá nevndini.

13. **Umsókn um stuðul til verkætlanina Sjóvinnuforum.**
   Endamálið við Sjóvinnuforum er at kunna um mál, ið hoyra til Sjóvinnuna, m.a. varpa ljós á útbúgving innan hesa vinnu.
   **Fíggjarnevndin 19.04.2021:**
   Nevndin mælir til ikki at luttaka í ella stuðla verkætlanini.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

14. **Umsókn um stuðul frá Suðuroyar Sjavsfelag.**
   Endamál felagsins er at savna inn pening til vælgerandi endamál í Suðuroynni. Søkt verður um

stuðul til m.a. gjald av hølisleigu.

**Avgerð:**

Samtykt varð við seks atkvøðum fyri ikki at stuðla hesum.

**15. Innkomið tilboð viðv. kampingøkinum.**

Hans Olaf Hentze, húsavørður hevur heintað inn tilboðið.

Bærendsen Teknik:

| | |
|---|---|
| Framleiðsla rustfrí trakt v. loki: | kr. 9.970,00 uttan MVG og uppsetan |
| Framleiðsla rustfrí borðpláta: | kr. 4.520,00 uttan MVG og uppsetan |

Tangavirkið lat onki tilboð inn.

**Tekniska nevnd 14.04.2021:**

Nevndin mælir til at taka av tilboðnum frá Bærendsen Teknik.

**Fíggjarnevndin 19.04.2021:**

Nevndin mælir til at taka av hesum tilboði.

**Avgerð:**

Einmælt samtykt.

**16. Samstarv við MEA (Húsið fyri familjumenning).**

Endamálið við MEA, er at styrkja familjuna. Uppskot um samstarvsavtalu millum Hvalbiar Kommunu og MEA, har árliga gjaldið er kr. 30 pr. borgara í kommununi, ella umleið kr. 20.000,00 um árið í trý ár.

**Trivnaðarnevndin 14.04.2021:**

Nevndin mælir til at taka upp samstarv við MEA og gjalda kostnaðin kr. 30 pr. borgara.

**Fíggjarnevndin 19.04.2021:**

Samtykt varð einmælt at mæla til at taka málið uppaftur, tá fíggjarætlanin 2022 verður gjørd.

**Avgerð:**

Atkvøtt varð um at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini. Samtykt við fýra atkvøðum fyri.

**17. Kostnaðarmeting uppá millumbygning í Brosinum.**

Kostnaðarmeting hjá Jens Chr. Joensen:

| | |
|---|---|
| Glasveggur íalt: | kr. 53.462,50 v/MVG |
| Timburveggur íalt: | kr. 45.337,50 v/MVG |

**Trivnaðarnevndin 14.04.2021:**

Nevndin mælir til, at millumbygningurin verður gjørdur úr glaseindum og kannar, um partur av útreiðslunum kann gerast av játtanini.

**Fíggjarnevndin 19.04.2021:**

Samtykt varð einmælt at mæla til at seta peningin av á fíggjarætlanini 2022.

**Avgerð:**

Samtykt varð við fýra atkvøðum fyri at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini. Eir, Gunnhild og

Thorstein tóku ikki undir við hesum.

**18. Sorgarætlan / tilbúgvingarætlan fyri dagstovnin Brosið.**

Sorgarætlanin er gjørd út frá mannagongdum, ið aðrir dagstovnar eisini brúka.
Tilfarið í Tilbúgvingarætlanini er í samráð við ANSNI og er gjørd út frá vegleiðing/mannagongdum frá aðrari tilbúgving, ið ANSNI hevur arbeitt við.

**Trivnaðarnevndin 14.04.2021:**

Nevndin hevur ongar viðmerkingar til sorgarætlanina og metir, at henda er klár at taka í nýtslu.
Nevndin hevur ongar viðmerkingar til tilbúgvingarætlanina og mælir til at taka hesa í nýtslu.

**Avgerð:**

Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá Trivnaðarnevndini og taka sorgarætlan og tilbúgvingarætlan fyri dagstovnin í nýtslu, tilbúgvingarætlanin tó við teirri treyt, at Felags Tilbúgvingarnevndin góðtekur ætlanina.

**19. Gáva til nýggj húsarhald.**

Uppskot frá Trivnaðarnevndin um gávu til nýggjar tilflytarar.

**Trivnaðarnevndin 14.04.2021:**

Nevndin er samd um at geva gávu til nýggjar tilflytarar, ið ikki hava búð í kommununi áður.

**Fíggjarnevndin 19.04.2021:**

Samtykt varð einmælt at mæla til ikki at taka undir við hesum.

**Avgerð:**

Samtykt varð við fýra atkvøðum fyri at fylgja tilmælinum hjá Trivnaðarnevndini.

**20. Skriv frá Nitu Næs um stuðul til koyring til eldrafimleik.**

Søkt verður um framhaldandi stuðul til koyring til eldrafimleik.

**Fíggjarnevndin 19.04.2021:**

Samtykt varð einmælt at mæla til at játta koyring til eldrafimleik eins og undanfarin ár, frá 01.01.2021 til 31.12.2024.

**Avgerð:**

Einmælt samtykt.

**21. Ikki almenn mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 18.30

Janus Thomsen Ronni Hammer Eir J. Norðberg Niels Olaf Eyvindsson

Gunnhild Mortensen Thorstein Thomsen Martin í Nesi